# Sangyvirlit

1 80’ini .......... 1
2 Aldan .......... 1
3 Annan sang .......... 2
4 Champagne Supernova .......... 3
5 Charlie .......... 5
6 Don’t look back in anger .......... 6
7 Dupultsong .......... 8
8 Eg flýggi til tónleikin .......... 9
9 Eg siti so eina .......... 10
10 Eins og áarstreymur rennur .......... 11
11 Eitt sunnukvøld í plantasjuni .......... 12
12 Eros .......... 13
13 Fagra blóma .......... 14
14 Flytifuglar .......... 14
15 Grøv nr. 13 .......... 16
16 Herbergið .......... 17
17 Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt .......... 18
18 Høgra jam .......... 19
19 I en lille båd der gynger .......... 21
20 Í góðum veðrið hann dyrgdi .......... 22
21 Kom og dansa .......... 23
22 Kvøld á Tinganesi .......... 24
23 Lívsmynd .......... 25
24 Ljóðmynd .......... 26

25 Medistari í karry .....27
26 Mín dingeling .....28
27 Morgun .....29
28 Nánd .....30
29 Náttarlongsul .....31
30 Nummar .....32
31 Piano Man .....33
32 Ró .....35
33 Rundferðin .....36
34 Seinasta vaktin .....37
35 Sildavalsurin .....38
36 Súrligar nætur .....39
37 Sweet Caroline .....40
38 The second you sleep .....41
39 The wild rover .....42
40 Those were the days .....43
41 Tú .....44
42 Vágagellan .....45
43 What’s up .....45
44 Wonderwall .....47
45 Zombie .....49

# 1 80’ini

Eg vakni, men vil bara balla meg inn,
øll ting tykjast tyngri og tyngja mítt sinn
Sjálvt morgunin boðar ein skýmligan dag
So veit eg tað hjálpir at syngja eitt lag

Eg í 80’ini livi, syngi og skrivi
Um okkum, sum her eru til
Tá gott er at flenna, práta og kenna
Ein kærleik’ — har alt verður til
Har alt ber til, har eg verði til

So veit eg, úr degnum lætnar eitt skýggj
í dansinum kanska eitt fitt lítið fríggj
Við vinum eg skáli eina heilsu um frið
Og sangurin byrjar og øll syngja við

Vit elska og liva, syngja og skriva
Um heimin, vit øll hoyra til
Og vit vilja øll flenna, práta og kenna
Ein kærleika har alt verður til
Har alt ber til, har eg verði til

# 2 Aldan

1. Altíð ræddist eg taran í sjónum,
rekandi vøkstur um klettar og brot,
síðani, saman við ótta og vónum,
hevur tú rikið mítt hjarta á flot.

Niðurlag: Tak í meg, tak um mín iva,
nem við meg, nert ikki við,
sissa meg, tá eg vil liva, øs meg,

tá eg biði um frið.

2. Nú ert tú aldan, og eg eri tarin,
dregur meg at tær og rekur meg frá,
eigi teg, eigi teg, tá tú ert farin,
veit at eg missi teg, tá tú ert hjá.

3. Alt tað, sum lokkar og alt, sum vil styggja,
fløðandi, fjarandi ert tú í mær,
lyftur meg upp nú og letur meg liggja,
myrkrið, sum bjargar og ljósið, sum slær.

4. Ræddist eg sjógvin við myrkri og megi,
visti meg stíga á ótryggan veg,
líknandi leið, men við rekandi gleði,
gangi eg nú : Nú ræðist eg teg.

Niðurlag: Tak í meg, tak um mín iva,
nem við meg, nert ikki við,
sissa meg, tá eg vil liva, øs meg,
tá eg biði um frið.

# 3 Annan sang

Her standi eg í havnargøtum og lýði á
Meðan hinumegin vegin
stendur kinnareyð og fegin
Hon og sigur frá

Um hin stóra dagin, tá ið hon friðin fann,
og eg hugsi við mær sjálvum
at tann friðin, sum eg átti,
tók hon við sær tá.

*Fyrr sang hon sangir um kerligheit*
*um erotikk yvirhøvur*
*nú syngur hon um ta stóru herligheit,*
*sum hon fann millum systrar og brøður*

Hennara mjúka rødd ein kaldan vetrardag
vekir minnir, sum eg royni
krógva burtur, men eg gloymi
bæði tíð og stað.

Hómi annan sang og onnur eygnabrá,
og eg hugsi við mær sjálvum,
at eg havi altíð verið hálvur
líka síðan tá.

## 4 Champagne Supernova

How many special people change?
How many lives are living strange?
Where were you while we were getting high?

Slowly walking down the hall
Faster than a cannonball
Where were you while we were getting high?

Someday you will find me
Caught beneath the landslide
In a Champagne Supernova in the sky
Someday you will find me
Caught beneath the landslide
In a Champagne Supernova
A Champagne Supernova in the sky

Wake up the dawn and ask her why
A dreamer dreams, she never dies?
Wipe that tear away now from your eye
Slowly walking down the hall
Faster than a cannonball
Where were you while we were getting high?

Someday you will find me
Caught beneath the landslide
In a Champagne Supernova in the sky
Someday you will find me
Caught beneath the landslide
In a Champagne Supernova
A Champagne Supernova

[Bridge]
′Cause people believe that they're
Gonna get away for the summer
But you and I, we live and die
The world′s still spinning 'round
We don't know why
Why? Why? Why? Why?

Repeat verse 1

[Bridge]
′Cause people believe that they′re
Gonna get away for the summer
But you and I, we live and die
The world's still spinning round
We don′t know why
Why? Why? Why? Why?

[Verse]

How many special people change?
How many lives are living strange?

Where were you while we were getting high?
We were getting high
We were getting high

# 5 Charlie

Charlie var ein løgin apa
Ikki sum aðrar apur plaga at vera
Hann var vanur við tapa
Og hinar apurnar plagdu hann at provokera

Lívið í skógnum hevði hann fingið nokk av
Hann vildi inn í býin at tjena pengar
Hann var ikki nøgdur fyrr enn hann bara svav
Og hevði pengar í banar langar-ar-ar

*Hinar apurnar kundu bara latið vera*
*Við at provokera Charlie*
*Nú er ovseint til at umbera*
*Fyri at hava provokerað Charlie*

Skjótt dagar og mánar gingu
Charlie var vorðin stuntmaður
Sítt dreymajobb hevði hann so fingið
Endiliga var Charlie glaður

Charlie var nú vorðin heimskendur
Og øllum teimum stóru filmunum hann spældi við
Frá arbeiðinum hann aldri kundi blíva rendur
Og uppeftir er hansara karriera farin á glið

*Hinar apurnar kundu bara latið vera*
*Við at provokera Charlie*
*Nú er ovseint til at umbera*
*Fyri at hava provokerað Charlie*

Charlie var nú komin á toppin
Hann átti sína egnu Harlie
Í playgirl vísti hann nú kroppin
Hetta var saga’in um Charlie

# 6 Don’t look back in anger

Slip inside the eye of your mind
Don't you know you might find
A better place to play?
You said that you'd never been
But all the things that you've seen
Slowly fade away

So I start a revolution from my bed
'Cause you said the brains I had went to my head
Step outside, summertime's in bloom
Stand up beside the fireplace, take that look from off your face
You ain't ever gonna burn my heart out

And so, Sally can wait
She knows it's too late as we're walkin' on by
Her soul slides away
But "Don't look back in anger," I heard you say

Take me to the place where you go
Where nobody knows if it's night or day
Please don't put your life in the hands

Of a rock 'n' roll band
Who'll throw it all away

I'm gonna start a revolution from my bed
'Cause you said the brains I had went to my head
Step outside, 'cause summertime's in bloom
Stand up beside the fireplace, take that look from off your face
'Cause you ain't ever gonna burn my heart out

And so, Sally can wait,
She knows it's too late as she's walking on by
My soul slides away
But "Don't look back in anger," I heard you say

So, Sally can wait
She knows it's too late as we're walking on by
Her soul slides away
But "Don't look back in anger," I heard you say

So, Sally can wait
She knows it's too late as she's walking on by
My soul slides away
But "Don't look back in anger, don't look back in anger"
I heard you say
"At least not today"

# 7 Dupultsong

Hygg, nú var hon hvít og rein
lat seg í so fína
segði tú, og hugdi út
og farið er at skýma…

Men tú ert eisini rein sum snjó,
og hárið fagurt glansar,
varrarnar sum hjartablóð
og allar kenslur dansa.

– hóast kavin liggur tjúkkur nú
yvir bø og ong
so er tað sum í tropunum
í okkara dupultsong

Tað sum dagur ikki sá,
kann náttin ofta hoyra,
segði tú, og streyk mær blítt
og beyt meg lætt í oyra.

– hóast kavin liggur tjúkkur nú…

Dagar fáa ofta rós
tá sól til viða fer,
men tú mín góða
ikki fyrr enn morgun aftur er

– hóast kavin liggur tjúkkur nú…

# 8 Eg flýggi til tónleikin

Eg spyrji meg sjálvan
hvar gongur mín leið
ár undan ári
frá juni til mai

Ferðist í blindum
í kærleikans magt
og eg skilji ei alt tað
sum tú hevur sagt

Eg flýggi til tónleikin
kenslur innan úr mær
koma via tónleikin
og hann útihýsir tær

Eg spyrji meg sjálvan
hvar gongur mín leið
tú og eg hvørt um annað
áh, eg orki ei meir

Eg flýggi til tónleikin…

Ferðist í blindum…

Eg flýggi til tónleikin…
…Eg flýggi til tónleikin yeah
Eg flýggi til tónleikin yeah
Eg flýggi til tóóónleikin.

# 9 Eg siti so eina

Eg siti so eina við bálið í kvøld  og
hugsið um teg, mín elskaða nú sólin
ferð niður og náttin gerst køld  og
stjørnunar glitrað himni á.

Eg reið mær avstað til Texas bý
yvir prerians gøtur fjøll og líð
eg reið mær henda langa veg tí
eg skuldi hitta teg, mín hestur,
mín saðil og eg.

Og nú vit aftur eru saman her  við
longsli eg taki teg í favn aftaná
hesa longu vandamiklu ferð  og
teski títt elskaða navn.

Eg reið mær avstað til Texas bý
yvir prerians gøtur fjøll og líð
eg reið mær henda langa veg tí
eg skuldi hitta teg, mín hestur,
mín saðil og eg.

## 10 Eins og áarstreymur rennur

Eins og áarstreymur rennur
vallar hugurin hjá mær, og í
barmi mínum brennur
longsil út um bygdagarð; Eg
vil skoða villar víddir,  eg
vil njóta sól og vind!
Fagurt hagin nú er skrýddur,
lætt fer lot um fjallatind.

Felagar, tit pjøkan takið,
kom í hagan burt við mær,
vendi bygdini so bakið –
móti okkum sólin lær.
Hoyrið fuglaljóð í haga,
síggið seyðafylgi mong, dýr
og menniskju seg gleða:
Trív tí í ein vallarsong.

Tá ið eftir dagsins hita
kaldligt lot um víddir fer,
snípan letur okkum vita,
at tað hvíldarstund  nú er,
og tá fara vit í tjaldið, og
vit sova sælan blund,
inntil náttin missir valdið
á tí snimmu morgunstund.

## 11 Eitt sunnukvøld í plantasjuni

Eitt sunnukvøld í plantasjuni,
har sita tvey lið um lið: ein
genta og ein drongur, nei, nú
orki eg ikki longur. Eg aftan
fyri tey lá eitt sunnukvøld í
plantasjuni.

Tey tosa um stjørnur og mána sita
eina løtur og gána, men so loypa tey
upp við ein hvøkk – tað var nakað,
sum gjørdi tey kløkk.
Hetta aftan fyri tey lá eitt
sunnukvøld í plantasjuni.

O, góða, o, góða, kom og set teg her hjá mær!
O, góða, o, góða, kom nú, meðan slett ongin sær.
Her er so góður friður, so tú kanst seta teg niður,
:/: her er so gott og so hugnaligt, tí
tú ert mær so fitt, so fitt :/:

Eg fjaldur undir greinunum lá fyri tey
meg ei skuldu sjá, men so kom eg til
at bróta eina grein, so tað runt um
plantasjuna hvein tað var hetta, sum
gjørdi tey kløkk – eitt sunnukvøld í
plantasjuni.

O, góða…

## 12 Eros

Vilt tú ikki sita her
eina løtu nú hjá mær
so eg kann kína og kyssa teg
og vera tær so nær.

Nú býurin skjótt sova skal
og myrkrið biður góða nátt
legg teg bara her so væl
fevn og kroyst mín kropp

Vit gloyma dagsins strev
í morgin er aftur frídagur
og Eros so loyndarfullur lær
bara hann okkum sær

Nú sólin sendir geislar inn
í eina lítla lon so veik
har liggja tvey saman ballað skinn
eftir ástarleik

Um vit gloyma dagsins stríð
geva hvørjum øðrum tíð
kann Eros ikki halda frí
tað leggur hann einki í

Tú mást ei fara heim í kvøld
verð nú her hjá mær
so eg kann merkja tín mjúka kropp
heilt nær at mær

# 13 Fagra blóma

Fagra blóma, tú sum prýðir
fjallatindar, berg og skørð,
bø og ong og grønar líðir,
hvat er fagrari á jørð?
Eina blómu tó eg kenni,
fagrast hon av øllum er,
sjálvt ei rósan líkist henni:
Tað er hon, eg valdi mær.

Blómur spretta móti vári,
følna tá ið heystið er.
Mín hon blóma man alt árið,
um so kalt og kavi er.
Einaferð hon bert kann blóma,
følnar hon, eg følni við.
Fylgja skal eg blómu míni
til tann síðsta hvíldarfrið.

# 14 Flytifuglar

Summarið er burt,
hvassir vindar strúka fram um vøll,
leyvið fer av trøunum,
nú heystið komið er.

Fuglar flyta burt
í onnur lond
flyta avstað,
leingjast eftir sól,
vetrarluftin køvir alt,
nú er vorðið myrkt og kalt.

Men tá eg fyrst sá teg,
sá eg logan bjarta.
Og beint nú bylgist tú
í míni sál.

Goyma vit løturnar,
tá ið landið lá í sól.
Eiga vit dreymarnar
aftur fuglur ger sær ból.

Stjørnuklárt er kvøld,
frostið klæðir kaldar greinar,
ber tað móti nátt,
á veg um vetrargátt.

Fuglar flyta burt
í onnur lond,
flyta avstað,
leingjast eftir sól,
vetrarluftin køvir alt,
nú er vorðið myrkt og kalt.

Men tá eg fyrst sá teg,
sá eg logan bjarta.
Og beint nú bylgist tú
í míni sál.

Goyma vit løturnar,
tá ið landið lá í sól.
Eiga vit dreymarnar
aftur fuglur ger sær ból.

Men tá eg fyrst sá teg,
sá eg logan bjarta.

Og beint nú bylgist tú
í mínum hjarta.

## 15 Grøv nr. 13

Ongin vitjar grøv nr. 13
Ongantíð sært tú blómur har
einans gras sum fjalir nummarspjaldri
og sum misprýðir ein so vakran kirkjugarð

Men eg síggi bæði blómur og liljur
og rósur sum prýða hesa grøv.
Og eg síggi eitt menniskja so vakurt,
sum ongantíð verur til støv

Tí tí tí......

Vit vilja ongantíð doyggja,
vit vilja liva í alla tíð.
Vit vilja liva um vit doyggja,
so spyr ein hvør hvat og hví

Spyr ein til tykkum, sum hava mist ein góðan,
hann er eið farin, men stendur við tykkar' lið
Komi tit út á grøv nr. 13,
so gera vit eitt kór, har øll syngja við,

Tí tí tí......

Vit vilja ongantíð......

# 16 Herbergið

Vit eru heimleysir,
Og vit hava ongar pengar.
Renna runt í Havnini,
Sum nakrir ólukku fangar
Fólk tey flenna, tá vit koma framvið.
Aldrin er tað nakar, sum situr við okkara lið.

Vit búgva á Herberginum.
Vit hava eina heila madrass í part.
Vit gingu einaferð í skúla,
Men har hava vit einki lært.
Vit búgva á Herberginum.
Vit hava eitt heilt jogurt í part.
Vit dugdu einaferð at arbeiða,
Men nú hava vit gloymt alt,
Sum vit hava lært,
Sum vit hava lært.

Her eru grønlendarir.
Tað kemur ein nýggjur hvørt ár.
Og teir verða genspleisaðir,
tá eggini eru klár.
Ja ja, fólk tey flenna,
tá teir koma framvið.
Aldrin er tað nakar, sum situr við teirra lið.
Jaja.

Vit búgva á Herberginum.
Vit hava eina heila madrass í part.
Vit gingu einaferð í skúla,
men har hava vit einki lært.
Vit búgva á Herberginum.

Vit hava eitt heilt jogurt í part.
Vit dugdu jú einaferð at arbeiða,
men nú hava vit gloymt alt
sum vit hava lært, sum vit hava lært,
sum vit hava lært, sum vit hava lært.

## 17 Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt

```
D7   G             Em  Am  D7
Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt
   G      G7  C    C#dim
og gamalt vinalag,
     G            Em  Am  D7
hvør skuldi gamlar gøtur gloymt
B7    Em  Am7 D7 G
og mangan góðan dag.
```

Fyri mangan góðan dag, ið var,
drekk nú eitt glas við mær,
vit tøma eina vinaskál
og minnast tíð, ið var.

Vit runnu upp í brekkurnar,
har blomstur vaks og ber,
men síðan varð mangt sporið tungt
í tíð, sum farin er.

Vit spældu allan dag við skip
og floyttu eftir á,
men leingi vítt og vágvilt hav
ímillum okkum lá.

Her rætti eg tær bróðurhond,
og rætt tú tína mær,

vit bera glas at munni so
og minnast tíð, ið var.

## 18 Høgra jam

Eg fái einki konufólk
hvat skal eg gera við tað.
Eg brúki skúm og clearasil
og havið enntá verið í bað

Eg havið eina stóra nós
hvat skal eg gera við tað
Flúgvuoyrur, yvirbit
men mamma sigur; legg tú ei í tað

[Niðurlag]
Eg brúki høgru
men hvat hjálpir tað
Havið entá Filmnet
men bara mikudag (tá er mamma í bað)

Nógvar vinir havið eg
hjá teimum er tað lætt
Men hvørja fer eg royni meg
tá hendur okkurt yvir mega flatt

[Niðurlag]

So ein dagin hendi tað
at eg damu fekk (ná)
Hon kundi fingið ein og hvønn
men hon valdi meg og vil sluppu okkum vekk

Tá vit vóru komin heim
vit lótu okkum úr
Eg hevði ikki Rambo kropp
men sjálvt ikki tá bleiv hon súr

[Niðurlag]
Hon var nú nakin
tað skuldi henda í dag
Eg var so spentur
tá hon legði seg á knæ (sovrit hevði eg aldrin
sæð)

Tá vit skuldu gera tað
hitt freka tú veist
Tá var eg eitt nervavrak
sum ikki vildi reisa seg, mítt beist

[Niðurlag]
Hettar var søgan
um hvat kann henda tær
Um tú ert ov spentur
og sjálvdan damu fær (ja)

Tú brúkar høgru
hvønn tann einasta dag
Og kanska Filmnet
men hvat, ja hvat hjálpir tað

## 19 I en lille båd der gynger

I en lille båd der gynger
sidder jeg og synger
Synger om de ting der gi'r liver
værdi
Jeg ka' ikke gå på vandet
men jeg ka' så meget andet
Jeg kan føle mig glad Jeg kan føle
mig fri

Der er forår i min mave
Jeg ved hvad jeg vil lave
ud og finde fred
fri for nogen der glor
Drive rundt ude på fjorden
med begge ben på jorden
Jeg er godt tilfreds
med en pilsner i snor

I en lille båd der gynger…
Prøv og mærk hvor luften sitrer
se op vandet hvor der glitrer
Jeg har masser af tid
og slet ingen ur
Her er duft af tang og tjære
det er lige til at bære
Tør en fisk på en rist
fra et gammelt komfur

I en lille båd der gynger…

## 20 Í góðum veðrið hann dyrgdi

Í góðum  veðri hann dyrgdi
heilt uppi við Eystfalsskerr;
og heima sat mamman og syrgdi,
so boysin tann pilturin er.
Men seinni hann fór út at trola
og legði so langt út á hav,
har stórir sjógvar teir skola
og snýsa so mangt omanav.

Í Skotlandi  seldu teir fiskin,
har fekk hann ein góðan vin,
hon stóð har og flenti við diskin
har suðri í Aberdeen.
Tá átti hann peningar nógvar,
og hartil var lyndið lætt,
og henni so keypti hann skógvar
og hartil ein reyðan hatt.

Men brátt mundi gentan hann narra,
tað tók honum dygt og tætt.
Á havinum riturnar karra
og flúgva úr ætt í ætt.
Tá var tað, hann skifti hýru
at slíta tey trongu bond
og sigldi við Óla á Mýru
heilt suður í onnur lond.

So var tað ein dagin, teir lógu
við brúnna í Singapore,
eina føroyska skútu teir sóu,
og skiparin kom umborð.

Tá stóð hann og longdist og syrgdi,
so lítil var vorðin verð.
Hann mintist til drongin sum dyrgdi
heilt uppi við Eystfalssker.

Har frammi teir gjørdu eitt gildi,
og har fór mangt glasið í sor;
men tá ið teir heim aftur hildu,
var drongurin við umborð.
Teir bógvaðu gjøgnum monsunin,
og ofta var ódnin hørð;
men altíð so áttu teir munin
og komu á Skálafjørð.

So róði hann sær til Havnar,
og mamman fekk silkistakk.
Ja, so gera slíkir stavnar,
sum sigla og liggja bakk.
Hann húsini bræddi og girdi,
so vøkur tann lonin er.
– Í góðum veðri hann dyrgdi
har uppi við Eystfalsker

# 21 Kom og dansa

Kom og dansa, hjartans kæri skattur mín!
Hoyr, fiólin káta kvøður hásong tín! Kvøður
kátt um elskhug og um søtan gleim; lat hann
bera okkum burt í annan heim!

Kom og dansa, kæra, legg teg í mín arm!
Lívgandi er hvíldin við tín mjúka barm. Lítla
hjartað titar eymligt móti mær, sum ein bangin
dúgva sárt við veingjum slær.

Fagra høvdið hvílir móti bringu blítt,
fuglaungin kennir reiðrið fjálgt og lýtt.
Skálkasøta brosið leikar vørrum á, spyr,
um ikki skjótt tær munnu kossin fá.

Eygu møtast – burt er horvið alt, sum er; eina
sveima vit í eini dreymaverð. Søtt sum blóman
angar, mjúkt sum aldan slær streymar heitt títt
unga yndi móti mær.

Alt er skýmligt, eina dansa tú og eg;  smáar
varrar teska eymt: „Eg elski teg!”  Ørur  eg
tær kyssi – streingir tagna brátt.
Svunnin er ein fríð og føgur dreymanátt.

## 22  Kvøld á Tinganesi

Stilla kvøldarmyrkrið lokkar ljósini fram
á skipum ið liggja við kai
tey speglast í smáum aldum á vánni
hetta forsummarskvøld í mai

Á Tinganesi siti eg og droymi
meg stillisliga upp um dagsins stríð
og allar mínar trupulleikar gloymi eg
uttanfyri stað og nakra tíð

Ein hvítur plastikposi stendur undir míni lið
fullur av grønum skaldadrykki
og endurljóð stendur úr turrari hellu
tá propparnar av eg rykki

Eg murri eina vísu um tað gleði

sum einans varir eina lítla stund
og hvørvur tá ið líður móti degi
tá jørðin aftur fer at blíva rund

Ein reynafrensur heldur konsert í onkrum skoti
á Bursatanga sita tvey og fríggja
og orðini tey teska hoyrast yvir alla vánna
til ein gomul likka setir seg at skríggja

Rundan um meg er alt gleðisrómur
sjálvt mánin er í sera góðum lag
men nú er posin við at vera tómur
eg reisist tí og vingli so avstað.

## 23 Lívsmynd

Enn eri eg ungur
Og enn í góðum lag
Mær tørvar onki føðibræv
Til at prógva tað.

Eg minnist ei mín barnadóp
Og mína grulvutíð
Nú eri eg nóg vaksin til
At skilja hvat og hví.

Eg vil elska
Eg vil syngja
Eg vil fevna kærleikan
Eg vil leita til tey støð
Har eg finni sannleikan

Lívið er mítt listarverk
Eg máli jú hvønn dag

Um eg fylli hundrað ár
Ei liðugt verður tað

Vónin er at myndin mín
Ein mildan skugga fær
Tá fólk í øllum heiminum
Frælsið ogna sær.

Eg vil elska
Eg vil liva
Eg vil syngja friðarlag
Saman við so nógvum menniskjum
Sum altíð vilja tað.

Vilja gráta
Vilja flenna
Ynskja frið í heiminum
Og við álit á hvønn annan
Læra mangt av lívinum.

## 24 Ljóðmynd

Myrkrið sígur yvir tekjur
leggur skuggar undir trø
guitarljóð úr einum glugga
spæla sorgarbundin løg

Út í kvøldið hoyrist látur
lokkar fram eitt lítið bros
hoyri gneggj frá einum hesti
og úr bønum vættratos

Reyðar baklyktir á vegnum
bilar strúka skjótt framvið

myrkir skuggar undir steyrum
fólk ið ganga lið við lið

Eg tømi enn ein kopp af kaffi
murri við til lívsins ró
leggi høvdið á mín kodda
sovni inn til kvøldsins ljóð

## 25 Medistari í karry

Sigmund æt ein drongur sum eg kendi her í býnum.
mamman Jakobina seldi vaflir undir krígnum
tey búðu í ein grønum húsum uppi undir Varða
og Sigmund átti búður har hann hevði ein taman stara
og ein dag uppundir ólavsøku mundi endað galið
tá hevði hann svølgt ein staralort og fór á hospitalið
hin gamla stóð í túninum so korkareyð í fjesi
áh hasin dummi hundurin hann heldur seg vera eitt vesi

So flutti hann til Danmarkar, trúðlovaðist Mikalu
hon dóttir var ein slaktara við farsi sum spesiali
Mikala gjørdist bumbutjúkk og føddi sonin Gundur
og Sigmund stóð við hvørnina sum elti farsi sundur
tað næsta sum eg hoyrdi var at Sigmund var forsvunnin
teir leitaðu og dreggjaðu men aldri bleiv hann funnin
nú hevði hann so segði hann júst fatur í tí rætta
tað var nú ólukksáligt ha? .. men soleiðis var hatta

So gekk man og funderaði og tú hevði væl gjørt tað sama
um grundirnar og orsøkir og hví og allan trama
men best sum er eitt leygarkvøld varð hend gátan svarað
tað hendi við eitt reisigildið uppi undir Varða
mín góði vinur Jóan Karl vað byrjaður at reirast
eitt typehús var úrslitið og hetta mátti feirast

við borið sótu hann og eg og systkinabarnið Harry
menuin var ein øl og so medistari í karry

Vit sita so og eta har og práta um tað farna
um kreppuna í landinum og um skutarin hjá Arna
so bítið eg í okkurt hart og sviðin er so meinur
ein knykil er í pylsuni so harður sum ein steinur
eg spýtið út og tað sum datt á borið var ein ringur
ovalur og skamfílaður úr deiggjinum hann stingur
graveringin fekk heilarútmur heilt upp á hægsta skala
har stóðu nøkur tøl og so til endands tín Mikala

Sum ryssa yvir deyðum fylið sótu vit gemalar
og gløddu hvør at øðrum tríggir bleikir kannibalar
við Sigmundi í tarminum vit sótu samanlæstir
men skuldið hann nú etast ja so vóru vit væl næstir
ja tað er ikki lukkuligt segði eg við Harry
at enda sínar dagar sum medistari í karry
vit hildu líkasum ervi saman kvøldið eftir
av trygdarávum ótu vit rabarbugreyt og knettir

## 26 Mín dingeling

Tá eg ein pinkalítil drongur var,
gav omma mær oyna gavø fra sær:
Tvær silvurklokkur festar í oyn ring,
og segði mær, at hetta var mín dingeling.

Mín dingeling, mín dingeling,
eg vil spæla við mín dingeling
mín dingeling, mín dingeling
eg vil spæla við mín dingeling.

Oynaferð eg klintraðist í bakkanum,
tá misti eg takið, fór eftir nakkanum,
eg lendi so hart, føldi pínu og sting,
men eg helt fast um mín dingeling.

Mín dingeling.....

Oynaferð, eg svam framvið gravaraa,
ta undir mær eg floyri stórar krabbar sa,
eg bloyv so kløkkur, svam bara í ring,
við baðum hondum haldandi um mín dingeling.
Mín dingeling.....

Hesin sangur er so søtur og rarur,
so gerið so væl og verið klarir,
og syngið við, ta ið eg sigi: »Sing«,
ella mugu tit spæla við tykkara egna dingiling -

Mín dingeling, ja, mín dingeling,
ongin skal spæla við mín dingeling,
mín dingeling, ja, mín dingeling
eg vil sleppa at spæla við tykkara dingeling !

## 27 Morgun

Morgun og nýføddur grátur
Vælkomin, lítli, stíg inn
í henda heimin sum gestur
Kanska tú dvølur eitt bil.
Um tú vilt korini vita
Best at eg sigi sum minst
Tó, eingin veit um júst títt lív
Skapt er til eydnu og ljós.

Ábyrgdin á tínum herðum
Gáva frá okkum til tín
Byrða, ið tung er at bera
Ber hana betur enn vit.

Heimurin fyri tær opin
Kannar teg gjølla og væl
Merktur av ringastu royndum
Býður tær kortini sess.
Men, tú eigur dagin og ljósið
Tú eigur náttina við
Tú eigur stjørnurnar allar
Tú eigur rættin til frið.

Viljin er sterkasta svørðið
Bítur á harðasta stál
Vónin er bjartasti brandur
Lýsir tær veg fram á mál.
Ábyrgdin á tínum herðum
-Gáva frá okkum til tín

## 28 Nánd

So rótleyst er sinni títt, altíð á ferð
tað tykist sum gloymir tú virðini her.
Hví droymir tú heldur um fjarskotin lond
enn síggja tað vakra, sum er í nánd?

Tær tykir at lívið er keðiligt - grátt,
hvønn er tað tú saknar - hví falla í fátt?
Tá aldri tú unnir tær hvíld ella frið,
fæst onki at grógva við tína lið.

Far innar í stovuna, um hon er trong
og lurta - hon syngur ein stillan song;
hon rúmar tó nakað, sum tú leggur í
har vantar bert tað - at tú varnast tí.

Tann eydnan, tú hómar um blánandi fjøll,
hvør sigur hon finst ei í heimahøll?

Tú átti ei friðleysur leita so fjart,
men lært teg at elska tað, sum tú sært.

# 29 Náttarlongsul

Brøvini frá tær
við vøkrum lyftum í
liggja undir koddanum hjá mær
Men tá hóskvøld er í Havn
og tú sum elskar vals
gott eg havi eina reyv av rom

Droymi um at tú
aftur er mær nær
droymi at vit saman, vitja ókend lond
droymi vit til mánan
ferðast aftur hond í hond
droymi at vit hoyra fuglasong

Náttin tykist long
sveittin vætir meg
við gluggan standi eg og hyggi út
Ímeðan Venus glitrar bjørt
um tirnu kavafjøll
fái eg mær eina Kings afturat.

## 30 Nummar

/:/ Eg eri eitt nummar
eg takið eitt nummar
alt lív mítt eitt nummar
men einki annað nummar
ið vil geva mær eitt nummar /:/

Hvar enn eg vendi mær
tú eyguni sendir mær
eg kann ei ferðast frítt í hesu verð
um tú spyr meg hvør eg eri
og eg svari tær sum er
tú bert minnir meg á
at mítt nummar nýtist her

Eg eri eitt nummar…

Identitetur er
søga í hesu verð
eri bert eitt nummar í rúgvuni
vís títt ID, vís títt tal
tú hevur einki annað val
tað tú hugsar, hvør tú er
tað líkamikið er

Eg eri eitt nummar…

Nú er summar
og tómir lummar
vin tín bummar
tí kassadamur dummar
ikki góðtaka títt nummar

## 31 Piano Man

It's nine o'clock on a Saturday
The regular crowd shuffles in
There's an old man sitting next to me
Making love to his tonic and gin

He says, "Son, can you play me a memory?
I'm not really sure how it goes
But it's sad and it's sweet
And I knew it complete
When I wore a younger man's clothes."

Sing us a song you're the piano man
Sing us a song tonight
Well, we're all in the mood for a melody
And you've got us feeling alright

Now John at the bar is a friend of mine
He gets me my drinks for free
And he's quick with a joke or to light up your smoke
But there's some place that he'd rather be

He says, "Bill, I believe this is killing me."
As the smile ran away from his face
"Well, I'm sure that I could be a movie star
If I could get out of this place."

Now Paul is a real estate novelist
Who never had time for a wife
And he's talking with Davy, who's still in the Navy
And probably will be for life

And the waitress is practicing politics

As the businessmen slowly get stoned
Yes, they're sharing a drink they call "Loneliness"
But it's better than drinking alone

Sing us a song. You're the piano man
Sing us a song tonight
Well, we're all in the mood for a melody
And you've got us feeling alright

It's a pretty good crowd for a Saturday
And the manager gives me a smile
'Cause he knows that it's me they've been coming to see
To forget about life for a while

And the piano. It sounds like a carnival
And the microphone smells like a beer
And they sit at the bar and put bread in my jar
And say, "Man, what are you doing here?"

Sing us a song. You're the piano man
Sing us a song tonight
Well, we're all in the mood for a melody
And you've got us feeling alright

## 32 Ró

1. Sólskinstøgn yvir okkum nú,
luftin fevnandi mjúk,
einsamøll, livandi, eg og tú,
ósøgdu orðini siga mær alt.

Niðurlag: Jørðin okkara, himinin við
døggváta grasið lær,
áin lokkar og teskas um frið
alla tíð verð hjá mær…

2. Sirmið sorgblíða silkibleytt
svalir rodnandi húð,
signað vit og av gleði mett,
aldri var heimur so sannur sum nú.

3. Dagmett sól søkir niðublund,
klokkan bíðandi slár,
skýmingstrøll seta friðarfund,
hoydi tú hamranna suðandi svar ?

4. Máni, vøkuljós ver í nátt,
mjørki dýna ver tú,
stíga vit so um dreymagátt,
gandaði heimur, verð altíð sum nú.

5. Morgun, bíða tú kanst eitt bil,
sov tær megi í nátt.
Vøkumaðurin verja vil,
teskar í tøgnini : “Alt vil tær gott, alt
vil tær gott.”

# 33 Rundferðin

Eitt fótbóltslið sum TB ei vit hava sæð,
teir vunnu bæði HB og onnur lið so fræg,
so fóru teir til Hetlands við Tjaldrinum ein dag
humørið var tað besta, ið nakar hevði sæð.

Farið fram garpar, vinnið hvønn dyst,
so at vit síggja, at TB er fyrst,
frá málmanni og út á uttasta vong,
ja, leiðarin er við, ja, leiðarin er við,
ja, øll kenna liðið frá Tvøroyrar bý.

Og Niels hevur felagið stovnað,
hann formaður var fyrstu ferð,
og nú er tað felagið stovnað,
so nú alt tað sama ger.
B36, B36, í ár gerast teir føroyameistarar,
B36, B36, í ár gerast teir føroyameistarar.

Fram er altíð fremsta lið,
Fram er altíð fremsta lið.
Á leikvøllum vit rópa okkum hásar við,
Fram er altíð fremsta lið.

Sunnast í Føroyum í ein útsynning
búleikast sumbingar um fjørðin kring,
her býr eitt mergjað fólkaslag,
í ítrótti sýna okur tað.

Liðið tað eitur KÍ; KÍ tað eru vit,
vit hava hvítan og bláan lit,
ja, KÍ, tað eru vit.

Eiðis Bóltfelag var einaferð komið nær,
ja, so nær at tað mundi doyð út,
men so fingu teir eitt mál og hartil ein pokal
drívið á, drívið á, drívið á.

Her kemur GÍ stavað við G,
GÍ er nakað heilt fyri seg,
segði tú G av fyrstan tíð,
so mást tú eisini siga Í.

Á, vit halda øll við NSÍ,
á, vit halda øll við NSÍ,
vit stuðla teir alt tað, vit megna,
úrslit tá vit munnu fá.

Men kenna tit eitt fótbóltslið,
sum altíð er á ferð,
og mangur ein tá frøist við
tað vakra spæl, ið er.

:/ Suður norð, eyst og vest, allar flest,
vita sjálvandi, at HB skorar mest,
hartil treyst, HB allastaðni best. :/

# 34 Seinasta vaktin

Alt hann átti á fold var ein koyggja,
og hann kendi seg heima umborð;
hann var gamal og lá til at doyggja,
og hann teskaði eymt hesi orð:

“Leið meg eina ferð enn út á dekkið,
lat meg ganga ta seinastu vakt,
lat meg stýra tað seinasta strekkið,

áðrenn skipið til kai hevur lagt."

Hetta far var mítt heim gjøgnum lívið,
og tað bar meg í suður og norð
Nú til hvíldar eg ruraður blívi,
mína seinastu frívakt umborð.

Tá mín deksvakt er komin at enda,
og mítt tørn til at stýra er av
Kann eg ongantíð út aftur venda
á tað stóra og brúsandi hav.

# 35 Sildavalsurin

Skútur brátt stevna av firði út,
ta norðhavssild at fanga.
Skiparin rópar um stýrhúsrút:
„Hey, latið springið ganga!"
Koyrir so á motorin,
snotilig skútan er vorðin.
Setur so kós í ein landnyðring,
loggið bert snurrar ein sólarring.
Skiparin sjógvin gradar,
brúkar sekstant og radar.
„Gerið nú greitt bæði trossar og gørn,
tí nú setast skal!"

Setan var góð, væl teir fingu í
á fimtan favna dýpi.
Gørnini fimti teir settu út,
av tunnum verður knípið.
Avhøvda flestu og gelda,
aðrir teir salta og skelda.

Kokkurin gamli tó glaður er,
„komið nú allir og skaffið her,
borðiskin havi eg djúpan,
kom, fá tykkum sildasúpan,
hon stimbrar og hitar hvønn einasta kropp,
sum nú kropin er!"

Sigla so inn aftur leygarkvøld,
teir glaðir munnu sjunga.
Harmonikan áður so deyð sum sild,
man út í dansin runga.
Ruski og polski har snurra,
norðmenn og sviar sum murra.
Har er bert ruðul og eingin kós,
stúgvandi fult eins og sild í dós
Har eru sildaknassar,
umframt teir sildabassar,
sum gørn teirra seta og fanga sær sprund
nú eitt leygarkvøld.

## 36 Súrligar nætur

1. Vaknandi húsafasadyr nú náttin er deyð
spyrja hvønn annan hvar fáa vit nú morgunbreyð
morgunin legði sín perlandi døgg á tín kinn
vit turkaðu brillurnar væl áðrenn vit fóru inn

2. Í tómligu tøgnini hittast av og á eygnabrá
lunkaði rundstykkir hvat skal tú nú hava uppá
ein lítlan til tín ein til mín ja tað riggar so væl
tá ein skal biðja teg lova sær at sova sær hjá tær

3. Og Langabrúgv leingist av longsli har yvir man skal
á tínum kamari kunnu vit helst sova væl

ein byrjandi býur bjóðar tær ein góðan dag
tú svarar takk fyri meg men mítt ríki er ei av ídag

4. Eg elski teg tak mína seinastu rest í tín favn
so gloyma vit súrligar nætur í Keypmannahavn
og meðan tú elskar meg hómi eg dalar og fjøll
angandi bø mjúkar sátur og spælandi børn.

## 37 Sweet Caroline

Where it began
I can't begin to know when
But then I know it's growin' strong
Was in the spring
And spring became the summer
Who'd have believed you'd come along?

Hands, touchin' hands
Reachin' out, touchin' me, touchin' you

Sweet Caroline
Good times never seemed so good
I've been inclined
To believe they never would
But now I…

Look at the night
And it don't seem so lonely
We fill it up with only two
And when I hurt
Hurtin' runs off my shoulders
How can I hurt when holdin' you?

One, touchin' one

Reachin' out, touchin' me, touchin' you

Sweet Caroline
Good times never seemed so good
I've been inclined
To believe they never would
Oh no, no

Sweet Caroline
Good times never seemed so good
Sweet Caroline
I believe they never could
Sweet Caroline
Good times never seemed so good

## 38 The second you sleep

[Verse]
You close your eyes
And leave me naked by your side
You close the door so I can't see
The love you keep inside
The love you keep for me
It fills me up
It feels like living in a dream
It fills me up so I can't see
The love you keep inside
The love you keep for me

[Chorus]
I stay to watch you fade away
I dream of you tonight
Tomorrow you'll be gone
It gives me time to stay

To watch you fade away
I dream of you tonight
Tomorrow you'll be gone
I wish by God you'd stay

[Verse]
I stay awake
I stay awake and watch you breathe
I stay awake and watch you fly
Away into the night
Escaping through a dream

[Chorus]

## 39 The wild rover

I’ve been the wild rover for many a year spent all my money on wisky and beer.

But now i’m returning with gold in restore never i play the wild rover no more.

And it’s no, nay, never, no, nay, never no more, will i play the wild rover no, never, no more

I went to a shanty i used to frequent told the landlady my mony was spent i asked her for credit, she answered me „Nay” saying: customers like you i can get any day.

I drew from my pocket ten sovereigns bright the landlady´s eyes opened wide with delight saying: i have the wisky and wine of the best and the words you told me were only injest.

I’ll go home to my parents, tell them what i’ve done and hope they will pardon their prodigal son and if they will do, as so often before  never i’ll play the wild rover no more.

And it’s no, …

## 40 Those were the days

Once upon a time there was a tavern
Where we used to raise a glass or two
Remember how we laughed away the hours
Dreamed of all the great things we would do?

[Chorus]
Those were the days, my friend
We thought they'd never end
We'd sing and dance forever and a day
We'd live the life we choose
We'd fight and never lose
For we were young and sure to have our way
La la la la...

[Verse 2]
Then the busy years went rushing by us
We lost our starry notions on the way
If by chance I'd see you in the tavern
We'd smile at one another and we'd say

[Chorus]
Those were the days, my friend
We thought they'd never end
We'd sing and dance forever and a day
We'd live the life we choose

We'd fight and never lose
Those were the days, oh yes,
those were the days
La la la la...

## 41 Tú

Tú, ja tú
Vilt tú vera mín í kvøld
Vilt tú liva saman við mær
Men bert til morgun aftur er

Og tað er tú, ja tú
Við stórum klárum eygum
ið iva í móti tær
Eg seti mina kós

Og eg fevni rundan um teg
Leggi hond á lør og bróst
Eg merki varrar tínar taka um mín munn
Og fingrar finna oman
Har kroppar verða eitt
Og ferðin hon er byrja til eitt stað
Har eingin hevur verið fyrr

Ja, eg fevni rundan um teg
Leggi hond á lør og bróst
Eg merki varrar tínar taka um mín munn
Og tungan finnur oman
Har kroppar verða eitt
Og ferðin hon er byrja til eitt stað
Eingin hevur verið fyrr

## 42 Vágagellan

Kastar og heintar og filar og dregur,
Tolin hon bíðar til eg bíti á.
Tað er bert eitt, hon í kvittanum hevur,
Ætlar sær fong heim til húsa við sær.
Kaldur og sveittur, ein ørvitisfiskur,
Eri eg, tá vágagellan er nær.

Fast er, ei nyttar at skrykkja ímóti.
Fast er, hon dregur meg, hvagar hon vil.
Hvat skal eg siga, og hvat skal eg gera,
Eg havi mist alt mítt vit og mítt skil.
Lat meg bert tiga, lat hana bert ráða;
Eingin er sum Vágagellan hjá mær.

Hon krøkir seg í meg og slítur meg sundur,
Fýkur avstað við mær, eg veit ikki hvar.
Einki kann bjarga mær, hon er eitt undur,
Eg eri ein drumbur og eg fylgi við.

## 43 What’s up

25 years and my life is still
Tryin' to get up that great big hill of hope
For a destination
I realized quickly when I knew I should
That the world was made up of this brotherhood of man
For whatever that means

[Pre-Chorus]
And so I cry sometimes when I'm lying in bed
Just to get it all out what's in my head
And I, I am feeling a little peculiar

And so I wake in the morning and I step outside
And I take a deep breath and I get real high
And I scream from the top of my lungs
"What's going on?"

[Chorus]
And I say, hey-ey-ey
Hey-ey-ey
I said "Hey, a-what's going on?"
And I say, hey-ey-ey
Hey-ey-ey
I said "Hey, a-what's going on?"

[Bridge]
Ooh, ooh
Ooh
Ooh, uh huh
Ooh, ooh
Ooh
Ooh, uh huh

[Verse 2]
And I try
Oh my God, do I try
I try all the time
In this institution
And I pray
Oh my God, do I pray
I pray every single day
For revolution

[Pre-Chorus]
And so I cry sometimes when I'm lying in bed
Just to get it all out, what's in my head

And I, I am feeling a little peculiar
And so I wake in the morning and I step outside
And I take a deep breath and I get real high
And I scream from the top of my lungs
"What's going on?"

[Chorus]
And I say, hey-ey-ey
Hey-ey-ey
I said "Hey, what's going on?"
And I say, hey-ey-ey
Hey-ey-ey
I said "Hey, a-what's going on?"

[Bridge]
Ooh, ooh
Ooh
Ooh, uh huh

[Outro]
25 years and my life is still
Tryin' to get up that great big hill of hope
For a destination, mmm

## 44 Wonderwall

Today is gonna be the day
that they're gonna throw it back to you
And by now, you shoulda somehow
realised what you gotta do
I don't believe that anybody
feels the way I do about you now

And backbeat, the word is on the street
that the fire in your heart is out
I'm sure you've heard it all before,
but you never really had a doubt
I don't believe that anybody
feels the way I do about you now

And all the roads we have to walk are winding
And all the lights that lead us there are blinding
There are many things that I would like to say to you,
but I don't know how

Because maybe
You're gonna be the one that saves me
And after all
You're my wonderwall

Today was gonna be the day,
but they'll never throw it back to you
And by now, you shoulda somehow
realised what you're not to do
I don't believe that anybody
feels the way I do about you now

Nú er vorðið seint
eg siti sum eitt býtt
ynski so at gloyma hesa verð
Og mær leingist heim til tín
at taka teg í favn
hugsi um hvat hendir heima nú

# 45 Zombie

Another head hangs lowly
Child is slowly taken
And the violence caused such silence
Who are we mistaken

But you see
It's not me
It's not my family
In your head
In your head
They are fighting

With their tanks
And their bombs
And their bombs
And their guns
In your head
In your head
They are cryin'

In your head
In your head
Zombie
Zombie
Zombie-ie-ie
What's in your head
In your head
Zombie
Zombie
Zombie-ie-ie-ie, o-oh
tu tu tu lu lu
tu tu tu lu lu

tu tu tu lu lu
tu tu tu lu luuu

Another mother's breakin'
Heart is taking over
When the violence causes silence
We must be mistaken

It's the same old theme
Since nineteen-sixteen
In your head
In your head
They're still fightin'

With their tanks
And their bombs
And their bombs
And their guns
In your head
In your head
They are dyin'

In your head
In your head
Zombie
Zombie
Zombie-ie-ie
What's in your head
In your head
Zombie
Zombie
Zombie-ie-ie-ie, o-oh, o-oh